

## Tryggingin stuðlar frælsa ítróttinum

Tryggingarfelagið Føroyar og Frælsur Ítrottur Føroyar hava skrivað undir sponsoravtalu. Frælsur Ítróttur Føroyar (FÍF) er í ferð við umfatandi broytingar innan frælsa ítróttin, og hetta krevur nógva orku. Tí frøast tey um, at tey við sponsoravtaluni hava fingið betri møguleikar at røkka hesum málum, veðrur sagt í tíðindaskrivi. Kristina Háfoss, ið er deildarstjóri á Tryggingarfelagnum Føroyum, fegnast um at kunna verða við til at menna tann frælsa ítróttin, fyri á tann hátt at kunna íbirta áhuga millum enn fleiri fólk til at takað ein sunnan lívsstíl til sín og soleiðis tryggja seg móti vælferðarsjúkum seinni í lívinum.

## 95 bátar til FM-róður

Freistin at melda bátar til FM-róðrarnar í ár er nú lokin. Íalt eru 95 bátar tilmeldaðir, og hesum eru seks tíggjumannafør. Tað hevur ljóðað, at bert tvær manningar fóru at vera í hesum róðrinum í ár, men so galið verður kanska ikki kortini. Tó skal havast í huga, at tað er vanligt, at ikki allir tilmeldaðir bátar taka lut í FM-kappingini. Teir 95 bátarnar eru býttir soleiðis: 21 5-mannafør við gentum, 14 5-mannafør við kvinnum, 19 5-mannafør við dreingjum, 12 6-mannafør við kvinnum, 15 6-mannafør við monnum, 8 8-mannafør og 6 10-mannafør.

# FS vann FM-heitið triðja árið á rað

**Triðja árið á rað eydnaðist Fuglafjarðar Svimjifelag at vinna føroyameistaraheitið, tá FM í svimjing var á skránni um vikuskiftið. Fuglafjarðar Svimjifelag vann ikki færri enn 15 gullheiðursmerki**

SVIMJING
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Tey síðstu mongu árini hevur Havnar Svimjifelag sitið trygt á trúnuni í føroyskari svimjing. Frá árunum 1988 til 2004 hevur Havnin vunnið FM-heitið á so at siga hvørjum ári, og áðrenn teir var Ægir tað sterkasta liðið. Teir vunnu nevniliga meistaraheitið rættiliga trygt í bæði 1985 og 1986.

Nú hevur eitt nýtt felag tó troka Havnar Svimjifelag av trúnuni. Fuglafjarðar Svimjifelag megnaði nevniliga um vikuskiftið at vinna føroyameistaraheitið triðja árið á rað. Teimum á baki komu Tvøroyrar Svimjifelag og Vágs Svimjifelag, meðan sigursvanda felagið úr Havnini endaði heilt afturi á fjórða plássi.

Sosialurin hevur tikið eitt prát við venjaran hjá Fuglafjarðar Svimjifelag, Petur Heðin á Fløtti, um góðu gongdina hjá FS.

### Væl nøgdur venjari

Petur Heðin á Fløtti var sum vera man væl nøgdur, tá ið tað gjørdist greitt sunnukvøldið, at Fuglafjarðar Svimjifelag hevði tryggjað sær føroyameistaraheitið. Hann heldur, at hørð venjing og miðvíst arbeiði hevur verið vegurin hjá svimjarunum í Fuglafirði.

- Vit hava arbeitt hart og miðvíst við svimjarunum her, og teir hava allir vant ótrúliga hart tey síðstu árini, og her síggja vit so úrslitið, sigur Petur Heðin á Fløtti.

- Karmarnir hava eisini verið sera góðir kring felagið, og hetta hevur heilt víst verið ein góð hjálp hjá svimjarunum.

Petur Heðin heldur eisini, at svimjararnir í Fuglafirði eru ógvuliga góðir, og at hetta sjálvandi er ein av størstu orsøkunum til góðu úrslitini.

- Ja, her er nógv gott fólk í Fuglafirði, og hetta er sjálvandi eisini ein av grundunum til, at vit klára at vinna meistaraheitið. Har afturat hava vit fingið tvær ordiligar kanónir úr Syðrugøtu í Elspu Mørkøre og Kára J. Á Høvdanum, og tey hava sjálvandi hjálpt væl til í okkara royndum at vinna meistaraheitið, heldur Petur Heðin.

### Gott samstarv við Ægir

Petur Heðin gleðist eisini um samstarvið, sum Fuglafjarðar Svimjifelag hevur havt við Ægir, og hann heldur eisini, at hetta hevur hjálpt svimjarunum.

- Vit hava havt eitt sera gott samstarv við Ægir í eina tíð, og hetta hevur mær dáma sera væl. Fyrsta lið hjá okkum hevur vant saman við fyrsta og øðrum liði hjá Ægir, og her hava okkara svimjarar fingið møguleika at vant í stórum hyli. Harafturat er kappingin í venjing sjálvandi vorðin harðari, og hetta hevur eisini hjálpt fyri svimjararnar hjá Fuglafjarðar Svimjifelag.

### Framtíðin sær ljós út

Um vikuskiftið var seinasti møguleikin hjá føroyskum svimjarum at klára kravtíðirnar til Oyggjaleikirnar, og endin var, at 17 svimjarar megnaðu at svimja undir kravdu tíðunum á teimum ymsu teinunum.

Petur Heðin heldur, at ungdómsarbeiði hjá Svimjisambandinum hevur verið gott tey síðstu árini, og at hetta eisini sæst aftur í svimjingini í dag.

- Vit hava syrgt fyri at hava lív í ungdómsarbeiðnum hjá Svimjisambandinum, og tey úrslitini sær man í dag. Landsliðshópurin vísir, at ungdómsarbeiðið hevur blómað, tí har eru so at siga bara ungir svimjarar við, sum hava tikið at kalla øll tey føroysku metini síðstu árini. Fleiri av svimjarunum hava eisini svomið undir vinnaratíðunum frá seinastu Oyggjaleikunum, so har skuldi verið møguleiki fyri onkrum heiðursmerki í summar, heldur Petur Heðin.

Hvat viðvíkur Fuglafjarðar Svimjifelag, so heldur hann eisini, at framtíðin sær ljós út hjá teimum.

- Ja, eg haldi, at tað sær ikki so galið út í Fuglafirði. Vit hava nógvar góðar svimjarar, og har eru eisini fleiri ungir svimjarar, sum skjótt fara at vera klárir at taka yvir. So eg haldi sum heild, at framtíðin her inni sær ljós út, sigur venjarin, Petur Heðin á Fløtti, at enda.



## Toppur og botnur hittast

**Støðutalvan sigur, at størsti spenningurin um úrslitið sunnudagin fer at verða á Skála, har KÍ fer at vitja**

UPPTAKT
*Jóannes Hansen*

8. umfar í Formula deildini er á skránni sunnudagin. Dýri biðjudagur er í morgin, og tá ið 7. umfar var í gjárkvøldið og hetta er síðsta blaðið í hesi vikuni, ber tað av góðum grundum ikki til at gera so nógv burturúr støðuni í feløgunum undan 8. umfari. Eyðkent fyri 8. umfar er tað, at tey ovastu fimm skulu spæla ímóti teimum fimm niðastu á støðutalvuni. Oddaliðið fær í Streymnesi vitjan av VB/Sumba, og HB skal spæla á Argjum. Í hesum báðum uppgerðunum eru greiðir favorittar. Mest opna uppgerðin verður ivaleyst á Skála, har KÍ fer at royna at fáa fyrsta málið og fyrsta stigið ella stigini frá Skála og John Petersen. Sambært støðutalvuni eigur NSÍ at vera favorittur í Gøtu. Í fyrsta umfari vann NSÍ 1-0 á Sandi. Málið fingu teir í yvirtíðini. Síðani hevur NSÍ tapt tríggjar ferðir á útivølli, og liðið hevur ikki megnað at skjóta mál í Klaksvík, í Gundadali ímóti HB og í Streymnesi. B36 er favorittur undan ferðini til Sands. Í 2. umfari tapti B36 3-0 í Runavík. Eftir henda stóra svipsaran hevur árstalsfelagið verið ógvuliga sannførandi í trimum útidystum. Níggju stig eru komin til høldar, einki mál er farið ígjøgnum hjá Jákupi Mikkelsen, og B36 hevur skorað fýra ferðir í Vági, eina ferð í Streymnesi og tríggjar ferðir í Gøtu. B71 hevur burturúr trimum heimadystum bara fingið stig ímóti GÍ (1-1). Tó hava tapini ímóti EB/Streymi (2-3) og NSÍ (0-1) verið so mikið tepur, at tað eigur at geva dirvi ímóti B36. Serliga tí kiksarin á Skála skal vaskast burtur.

AB-KÍ 1-3 (0-1)

# KÍ mundi snávað

**Fyrra umfarið høvdu gestirnir fult tamarhald á, men tað var um reppið, at AB gjørdi ein ordans vørr eftir steðgin**

AB

KÍ

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

KÍ vann kravda, ætlaða og væntaða sigurin á Argjum í gjárkvøldið. Talan var um uppibornan sigur, og serliga skuldi KÍ havt stongt dystin fyrstu trý korterini. Snøgt sagt, so fekk AB illa eitt bein at jørðini hesa løtuna, og ferð eftir ferð søkti KÍ oman móti málinum.

Talan gjørdist tó bert um tað eina málið, og hesum stóð Gunnar Nielsen fyri, tá hann stutt fyri steðgin varð spældur leysur av Paul Clapson.

Um klaksvíkingar tóku tað meira róligt, ella um argjamenn tóku seg saman, skal vera ósagt. Men tað var tó um reppið, at KÍ púrasta misti takið á dystinum. Tað eydnaðist tó at økja um leiðsluna, tá Clapson stríddi seg gjøgnum KÍ-verjuna, áðrenn hann enn einaferð legði bóltin til Gunnar. Og aftur hesa ferð var argentini kaldur.

### Misnýttu risamøguleika

So skuldi alt at kalla verið avgjørt, men AB slapp tó aftur upp í part. Fyrst minkaði Súni Fríði Barbá við einum røttum center-forward máli, og løtu seinni mundu argjafólk vena seg um, at tað ikki eydnaðist Fróða Clementsen at javna. Hornasparksinnlegg datt beint fyri føtur hansara, men úr trimum metrum sendi hann við síðuna av málinum.

AB legði alt meira fyri í royndunum at javna, og so gekk tað, sum tað so ofta ger í slíkum førum. Kristoffur Jacobsen fekk gott pláss ígongd, og tá hann so spældi til Clapson, kundi hesin sløkkja ljósið fyri AB.